tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Uttan fyri alt sømiligt mark

## *Oddagrein*

Tað var væntandi, at ein skipan við handilskvotum ella fiskidøgum fór at elva til løgnar sølur og ivingarsamar transaktiónir.

Vit hava sæð og hoyrt, at menn hava keypt gomul skip fyri at fáa fatur á veiðiloyvum at selja til aðrar. Eisini menn og fyritøkur, sum ikki hava við fiskivinnu at gera.

Hetta merkir, at veiðiloyvi eru vorðin ein handilsvøra í sjálvum sær. Tað var ikki ætlanin, men kortini eitt fyribrigdi, sum summi spáddu um.

Hetta hevur eisini gjørt seg galdandi í Íslandi, har kvotubárónar vinna hópin av peningi at leggja kvotur undir seg at selja øðrum.

Hetta er neyvan í samljóð við andan í lógini um vinnuligan fiskiskap, har tað verður sligið fast, at tilfeingið í sjónum er ogn Føroya fólks. Tí er tað gott, um lóg og reglur verða gjørdar neyvari.

Men tað mundi koma óvart á mong, at Fiskimálastýrið eisini er við í óhepnum avgerðum, sum tíðindini um Fram og Pelagos benda á.

Hevur Fiskimálastýrið latið hesum skipum eina størri kvotu fyri at geva teimum eitt størri søluvirði, eru vit komin út um alt sømiligt mark.

Nú sigur formaður í felagnum Nótaskip eitt og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eitt annað.

Uttan at taka dagar ímillum er í øllum førum talan um ein spurning, sum eigur at verða kannaður til botns, tí slíka mannagongd kann eitt rættarsamfelag ikki góðtaka.

*Sosialurin*

# Tómar skúlastovur

*Forkvinnan í Føroya Lærarafelag sigur, at felagið ikki hevur fingur við í spælinum, tá næmingar nú eisini eru í verkfalli. Hon metir, at forholdið millum næmingar og lærarar er tætt, og at næmingar duga at síggja, hvat lærarin leggur í sítt starv*

DAGFINN OLSEN

Nú frættist um tómar skúlastovur kring landið. Næmingar, serliga í framhaldsdeildunum, eru eisini farnir at mótmæla arbeiðssteðginum, ið er íkomin orsakað av ósemjuni millum Fíggjarmálastýrið og Lærarafelagið. Næmingarnir halda seg burtur.

Eisini frættist, at næmingar hava sent Signari á Brúnni, landsstyrismanni, mótmælisskriv.

### Felagið veit einki

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, sigur at felagið ikki hevur ein fingur við í spælinum, tá næmingar nú eru í verkfalli, men felagið hevur eisini hoyrt tíðindini.

Hon metir, at slíkt kemur spontant og at forholdið millum næmingar og lærarar er tættari, enn fleiri kanska halda. Eisini metir hon, at næmingar duga at síggja, hvat lærarin leggur í sítt starv og at tað er ein vanlukka, um nýggja lógin dettur niðurfyri.

- Næmingarnir eru bevístir, sigur Elsa Birgitta Petersen.

### Pengar eingin trupulleiki

Elsa Birgita Petersen vil ikki siga, hvussu longi Føroya Lærarafelag hevur ráð at halda fram við arbeiðssteðginum. Hon leggur tó dent á, at peningur er eingin trupulleiki og at felagið hevur ráð til verandi støðu í langa tíð.

### Skaalum arbeiðir

Tað skilst, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur gjørt eitt uppskot til partarnar at góðtaka ella vraka ella samráðast útfrá. Stýrið væntaði, at Lærarafelagið fekk uppskotið í gjár, men uppskotið skal fyrst út at venda hjá Fíggjarmálastýrinum.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at hon hevur skilt, at Fíggjarmálastýrið og semingsmaðurin Allan Skaalum arbeiða við hesum.

Allan Skaalum hevði í gjár verið í samband við Lærarafelagið, men visti ikki neyvt at siga, nær felagið fekk uppskotið.

Felagið hevur kravt at fáa uppskotið skrivligt.

### Ikki semingsuppskot

Forkvinnan í Lærarafelagnum leggur dent á, at talan er ikki um semingsuppskot, tí tað er Fíggjarmálastýrið og semingsmaðurin, ið arbeiða. Ikki Føroya Lærarafelag.

Hetta hóskar eisini væl við tað, ið felagið hevir hildið uppá, nevniliga, at myndugleikarnir eiga at spæla út.

Í Føroya Lærarafelag eru tey annars væl við tiltøkini hósdagin. Sáttmálasettir lærarar úr øllum landinum tóku lut og spontant komu næmingar eisini uppí mótmælisgonguna og hetta heldur forkvinnan í Føroya Lærarafelag eydnaðist væl.



*Ein tómur skúli… - Næmingarnir eru bevístir, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

# Kunna um fullveldi í donskum fjølmiðlum

*Landsstýrið rindar internetavísini hjá Jyllands-Posten 15 túsund krónur fyri eina lýsing, ið vísir til fullveldisheimasíðuna hjá landsstýrinum*

JOHN JOHANNESSEN

Tey, ið lesa danskar avísir á internetinum hava helst lagt til merkis, at ein lýsing fyri føroyskum fullveldi av og á kemur til sjóndar ovast á breddanum á internetútgávuni av Jyllands-Posten.

Talan er um eina stóra lýsing, ið stendur beint við síðuna av blaðhøvdinum og tískil á dýrasta og besta lýsingaplássinum.

Frá lýsingadeildini hjá donsku avísini fáa vit at vita, at ein slík lýsing kostar 15 túsund krónur hvørja ferð hon er við.

### Bert til kunning

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, heldur einki skeivt vera í at brúka pening til at kunna um fullveldisætlanina í Danmark.

– Vit skulu minnast til, at talan er um kunning og ikki um eina lýsingaherferð, sigur landsstýrismaðurin og vísir á, at lýsingin bert er eitt sokallað link, ið vísir til objektivu fullveldisheimasíðuna hjá landsstýrinum. Hetta merkir, at tá tú við músini klikkir á lýsingina, kemur tú inn á fullveldisheimasíðuna.

Landsstýrismaðurin vísir á, at avtalan við Jyllands-Posten er, at landsstýrið rindar 15 túsund krónur fyri lýsingina eina ferð. Talan er ikki um, at landsstýrið skal rinda fyri hvønn dag, lýsingin er á internetavísini.

At kunna við tíðindaskrivum, tíðindafundum og øðrum líknandi kring Danmark er nógv dýrari enn at kunna á internetinum fyri hesar 15 túsund krónurnar, er Høgni Hoydal sannførdur um.

### Skulu hava atgongd til tilfar

Sambært Høgna Hoydal leggur landsstýrið ógvuliga stóran dent á, at vanligi borgarin, bæði í Føroyum og aðrastaðni, skal hava atgongd til alt alment tilfar í fullveldismálinum. Tí hevur landsstýrið fullveldisheimasíðuna, har allar frágreiðingar og útrokningar eru at finna.

– Trupulleikin í fullveldismálinum hevur júst verið vantandi kunning, og tað er hetta vit nú royna at betra um, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrið hevur eisini sokallað link til fullveldisheimasíðuna á lýsingabjálkanum hjá internetsosialinum.




*Forsíðan á internetútgávuni av Jyllands Postinum*



## Næmingur í Føroya Sparikassa



# Ert tú tann rætti .........?

Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persón-ligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum um-hvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til
Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2000 kl. 16.

**FØROYA SPARIKASSI**
Starvsfólkadeildin Tinghúsvegur 7 100 Tórshavn Tel 31 48 00 Fax 31 94 82
E-mail: menningd@post.olivant.fo www.sparikassin.fo